## Semja um lógir

Tað verður eftir øllum at døma full semja í Løgtinginum, tá lógaruppskotini í sambandi við kirkjuyvirtøkuna koma til atkvøðugreiðslu. Uppskotini vóru til fyrstu viðgerð í Tinginum í gjár, og har boðaðu allir flokkar frá, at teir fara at taka undir við uppskotunum, ið sum væntað skulu viðgerast í mentanarnevndini fyrst. Talan er um tvey lógaruppskot. Eitt er um bygnaðin í kirkjuni, og hitt snýr seg um tey fíggjarligu viðurskiftini.

## Hevði fallið

Tað kann koma fyri, at ein floksformaður missir sætið á tingi, tá val er, og tað hevði eftir øllum at døma hent formanninum í íslendska Framsóknarflokkinum, hevði val verið til Altingið nú. Í hvussu er vísir ein nýggj meiningakanning hjá Gallup, at Jón Sigurðsson, floksformaður, hevði mist sítt sæti um umdømisvaldur tingmaður í valdøminum Reykjavík norður, var val nú, og at Sjálfstæðisflokkurin hevði fingið tann mannin.

# Listaverkini í Føroya Banka fara ongan veg

**Tey 1000 listaverkini, sum Føroya Banki eigur, skulu ikki fylgja við bankanum, tá ið hann verður einskildur**

LISTAVERK

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tey, sum keypa Føroya Banka, tá ið hann verður einskildur, skulu ikki seta nøsina upp ímóti at fáa stóra og virðismikla, listarliga dýrgripin hjá bankanum við í keypinum, sum eykavinning.

Nú hevur landsstýrið nevniliga tryggjað sær, at øll tey næstan 1000 listaverkini, sum Føroya Banki eigur, skulu takast burturúr bankanum áðrenn hann verður seldur og skulu sostatt ikki vera við í keypinum.

Tað upplýsti Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum í Løgtinginum nú ein dagin.

Føroya Banki eigur eitt av landsins størstu søvnum av føroyskari list.

Og nú bankin skal einskiljast, hava tingmenn reist spurningin um tað er rætt at listaverkini hjá bankanum fylgja við.

Fylgja listaverkini við keypinum, stúra teir fyri, at tey verða spjødd í allar ættir og verða kanska enntá send av landinum tí ein nýggjur eigari ger sjálvsagt við tey, sum hann vil.

Tí hava tingmenn spurt um tað ikki er rættast at taka listaverkini úr bankanum, áðrenn hann verður seldur, fyri at tryggja, at tey verða verandi almenn ogn.

Í løgtinginum hevur Óli Breckmann reist spurningin herfyri og stjórin í Listaskálanum hevur eisini reist hann.

Og nú hevur so Tórbjørn Jacobsen eisini spurt landsstýrismannin í fíggjarmálum um nøkur støða er tikin í málinum.

Sjálvur heldur hann, at tað hevði verið rætt at skilt listaverkini burturúr bankanum, áðrenn hann verður einskildur fyri at tryggja, at tey framvegis verða verandi ogn Føroya Fólks.



*Landsstýrið hevur tikið avgerð um, at tann, sum keypir Føroya Banka, skal ikki fáa tey 900 virðisiklu listaverkini hjá bankanum við í keypinum, tí tey skulu framhaldandi verða verandi fólksins ogn*

### Skulu verða ogn Føroya Fólks

Bárður Nilsen ásannaði, at listaverkini í Føroya Banka hava eitt heilt serligt virði.

- Tað eru stig tikin til at forða fyri, at listaverkini ikki verða seld saman við bankanum

Hann segði, at endamálið er at savna listaverkini á almennum hondum, at tey framvegis verða ogn hjá okkum øllum.

- Landsstýrið hevur viðgjørt spurningin og hevur avgjørt, at vit skulu tryggja okkum, at listaverkini hjá Føroya banka ikki verða seld saman við Bankanum.

Hann sigur, at nú verður arbeitt fyri at finna eina loysn, so at listaverkini gerast og hjá einum sjálvsognarstovni.

- Talan kann verða um at gera listaverkini til ogn hjá Listasavni Føroya. Men talan kann eisini verða um at skipa ein nýggjan sjálvsognarstovn, sum skal hava til endamáls at eiga hesi listaverkini.

Tingingar eru nú ímillum Mentamálaráðið og bankan, sum hvør loysnin skal vera.

- Tað einasta, Bárður Nielsen kundi staðfesta, er, at avgerðin er tikin um, at listaverkini skulu ikki vera við í søluni, tá ið Bankin verður einskildur.

Tórbjørn Jacobsen helt, at tað hevði týdning, at listaverkini kundi hanga frammi til fólk at frøast yvir. Men hann helt ikki, at tað var neyðugt, at allar myndirnar hingu á sama savnið í Havn.

Hann sá fyri sær, at eitt Mykines savn verður gjørt í Mykinesi og at eitt Stefan Danielsen Savn verður gjørt í Nólsoy, har allir hansara málningar verða savnaðir.

Bárður Nielsen segði, at øll listaverkini hjá bankanum eru til framsýningar og eftir at bankin verður einskildur, fara listaverkini í fyrsta umfarið at verða hangandi á bankadeildunum kring landið, tí umstøður eru ikki at goyma tær annars.

# Sigla ókeypis við Strandferðsluni í fýra dagar

**Í ár verður ókeypis at sigla við Strandferðsluni í fýra dagar og samstundis lækkar prísurin á ferðaseðlum eini 40% og Smyril fer at sigla meiri**

STRANDFERÐSLA

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin*

Um ein mánað henda stór framstig hjá teimum, sum sigla við Strandferðsluna.

Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í innlendismálum, segði í løgtinginum nú ein dagin, at um ein mánað fer Smyril at sigla tríggjar túrar meiri um vikuna. Men samstundis fer prísurin á ferðaseðlum við skipunum á Strandferðsluni at lækka eini 40%.



*Um ein mánað kunnu tey, sum sigla við Smyrli og hinum skipunum hjá Strandferðsluni, vænta stór framstig*

Jacob Vestergaard staðfestir samstundis, at ætlanin er, at tey, sum sigla ofta, skulu fáa tann størsta avslátturin, men tey, sum sigla sjáldan, fáa nógv minni avsláttur.

Harafturat er ætlanin at skipa fyri, at í fýra dagar skal tað verða ókeypis at sigla við Strandferðsluni, akkurát, sum tað er at koyra ígjøgnum undirsjóvartunlarnar.

Tveir av hesum døgum skulu vera somu dagar, sum tað eisini er ókeypis at koyra ígjøgnum undirsjóvartunlarnar og tveir dagar vera, tá ið fólkið í teimum ymsu økinum vilja hava teir gjaldsfríu dagarnar.

Hann segði, at alt hetta eru viðurskifti, sum Strandferðslan arbeiðir við, men enn er hon ikki komin á mál. Hinvegin væntar hann, at tað verður um ein mánað, at hetta verður sett í verk.

### Kollveltandi ferðaætlan

Harafturat er ætlanin at Smyril skal sigla tríggjar túrar afturat um vikuna. Og har er eisini ein kollveltandi broyting á veg.

Higartil hevur tað mestsum verið óskrivað lóg, at Smyril skal liggja í Suðuroy hvørja nátt og sigla fyrsta túrin til Havnar tíðliga um morgunin.

Ferðaætlanin er ikki løgd enn, men ætlanin er, at onkrar dagar í viku, skal Smyrli sigla seinasta túrin úr Suðuroy til Havnar klokkan níggju um kvøldið og liggja í Havnini um náttina. Síðani skal hann sigla fyrsta túrin suður suður klokkan seks um morgunin og so úr aftur Suðuroy klokkan níggju á morgni.

Tað verður serliga um vikuskiftið, at tað verða fleiri túrar.